Havnar leksikon:

# Fyrstu neon-gøtuljósini komu í 1957




Fyrsta gøtan í Havn sum fekk neon-gøtuljós var Áarvegurin. Hetta var í 1957.

Snórur varð spentur yvir um vegin, og ljósrørini vórðu hongd uppi yvir hvør síni koyribreyt. Hetta var eitt stórt framstig í mun til vanligu ljósperurnar í lyktapelunum.

Myndin er tikin á Áarvegnum í 1961. Fiat vørubilurin hjá kiosk Centrum, stendur uttan fyri handilin.

Í hesum húsunum hevur verið ymiskt virksemi upp gjøgnum tíðirnar, nevnast kann at í 1927 læt Aksel Andreasen (Aksel á Trónda) upp matstovu í húsunum, og frá 1931-33 hevði Jørgen F. Jacobsen (Jørgen á Áarvegnum) isenkramhandil har. Í 1940 byrjaði Kirstine Jacobsen í Stórustovu, vanliga nevnd Kims, við Centrum, ið var konditarí og kiosk. Hon helt til har til 1965, tá Marstein brøðurnir keyptu ognina, og Centrum flutti oman í bygningin hjá Heimavirkinum á Kongabrúnni. Í dag er klædnahandilin Seytjan í hesum húsunum.

Skeltið á handlinum »Tubbak« hjá Christian Dahl Restorff sæst við stórum stavum fest oman fyri sýnisgluggan. Tey húsini vórðu tikin niður, tá Hotel Hafnia seinni varð bygt út.

Urið uttan fyri Hotel Hafnia er við ur & optikkhandilin Skilling, ið helt til í bygninginum. Sum tað sæst á urinum uttan fyri hjá Skilling, er myndin tikin í døgurðatímanum, klokkan er 13 minuttir yvir tólv.

Til høgru á myndini sæst uppslagstalvan, har fólk við plakatum kundu kunngera ymisk tiltøk.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesa myndina, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168.

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

**Dagurin 10. mai**

**Gordianus,** deyður umleið 362. Heiðin rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og varð hálshøgdur.